# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Seinastu seks mánaðarnar hevur Obama framt 80 persónlig álop á Hillary, men hon hevur einki sagt (Bill Clinton)*

# Skuldu ikki beina fyri Jonas Gahr Støre



*Carsten Thomassen bleiv 38 ára gamal*

Taliban sigur, at málið við álopinum á Serena-hotellið í Kabul var ikki at myrða norska uttanríkisráðharran. Jú, sigur ST

-Tað vóru fýra av okkara monnum, sum framdu álopið á Serena-hotellið, men norski uttanríkisráðharrin var ikki høvuðsmálið. Satt at siga vistu vit als ikki, at hann var á hotellinum, segði ein talsmaður hjá Taliban við amerikonsku tíðindastovuna AP í gjárkvøldið.

Sjálvur heldur Jonas Gahr Støre ikki, at tað var hann, sum var álopsmálið.

-Eg havi onga orsøk til at halda, at álopið var ætlað mær, sigur hann við norskar fjølmiðlar. Seinnapartin fer hann úr Kabul til Noregs.

ST heldur harafturímóti uppá, at Taliban ætlaði at beina fyri norska uttanríkisráðharranum, og aðalskrivarin, Ban Ki-Moon, segði í gjárkvøldið, at ST fer at kanna tilburðin í Kabul væl og virðiliga.

Álopið á hotellið í Kabul kostaði ellivu mannalív. Millum teirra, sum doyðu, var tann 38 ára gamli norski tíðindamaðurin Carsten Thomassen, ið arbeiddi hjá Dagbladet. Hann varð særdur av skotum og doyði á einum kekkiskum hernaðarsjúkrahúsi í gjárkvøldið. Carsten Thomassen var ein avhildin tíðindamaður.

-Ter við stórari sorg, at eg havi fingið deyðsboðini av Carsten Thomassen. Eg kendi hann í mong ár. Hann var ein dugnaligur tíðindamaður og eitt gott fólk. Hann hevði stóran áhuga í týðandi málum. Eg fari at sakna hann, segði Jens Stoltenberg, forsætisráðharri, í gjárkvøldið.

### Sum í Irak

Taliban váttaði longu seinnapartin í gjár, at rørslan hevði ábyrgdina av álopinum á Serena-hotellið. Ein talsmaður segði við AP, at ein av monnunum hevði eina bum-bu uppi sær, meðan hinir søktu at hotellinum við maskinbyrsum og hondgranatum.

Norski myndamaðurin Stian Lysberg Solum, sum mátti renna undan skotum frá álopsmonnunum, segði aftaná, at álopsmenninir vóru í sama búna sum teir afghonsku stjórnarhermenninir.

Vesturlendskir eygleiðarar siga, at álopið á Serena-hotellið er eitt tekin um, at Taliban er farið at brúka somu framferð, sum uppreistrarmenninir í Irak hava brúkt.



*Uttanríkisráðharri, fekk boð um at leggja seg niður á gólvið, tá skotini dundu á hotellinum*

# Advokatur noyðist í fongsul fyri at avnokta jødatýningina

Týski advokaturin Sylvia Stolz kallar søguna um jødatýningina hjá nazistunum "heimsins størstu lygn". Tað gevur fongsulsrevsing

Sylvia Stolz skal sita í fongsli í hálvt fjórða ár, og hon sleppur ikki at virka sum sakførari tey næstu fimm árini.

Tann úrskurðin er rætturin komin til, eftir at Sylvia Stolz hevur sagt, at søgan um jødatýningina hjá nazistunum er "heimsins størsta lygn". Tað gjørdi hon í 2006, tá hon var verji hjá rithøvundinum Ernst Zündel, sum fekk fimm ára fongsul fyri at avnokta jødatýningina. Í rættinum váttaði hon fleiri skjøl við nazi-heilsanini "Heil Hitler", og hon rópti, at dómararnir áttu at fáa deyðarevsing fyri at hava hjálpt figgindunum hjá týsku tjóðini.

*Sylvia Stolz skrivaði »Heil Hitler« á rættarskjølini*



## STUTT SAGT

### Laden yngri til Bretlands

Omar bin Laden, sum er sonur yvirgangsleiðaran Osama bin Laden, hevur nú søkt um uppihaldsloyvi í Bretlandi. Omar bin Laden er 26 ára gamal og giftur við teirri 52 ára gomlu Jane Felix-Browne, og nú umhugsa tey at búseta seg í Moulton í Chesire, skrivar Daily Mail. Sambært blaðnum hava tey verið á bretsku sendistovuni í Kairo við umsóknini, og nú skal sendiharrin so taka støðu til, um sonur tann heimskendа yvirgangsmannin skal sleppa at búseta seg í Bretlandi. Jane Felix-Browne sigur við Daily Mail, at tey vænta sær ikki nakrar trupulleikar við umsóknini. Tey hava lógligt vígslubræv og bíða nú bara eftir einari almennari váttan um, at Omar er skyldur frá fyrru konu síni.

### Víðgongt umboð

Í Russlandi hevur Vladimir Putin, forseti, tilnevnt tjóðskaparmannin Dmitrij Rogozin russiskan umboðsmann í verjusamgonguni NATO. Eygleiðarar í Moksva siga, at Dmitrij Rogozin er limur í Móðurlandsflokkinum og ber orð fyri at siga sína hugsan. Millum annað er hann kendur fyri eitt uppskot um at skráseta samkynd sum lógloysingar, og hann hevur eisini verið talsmaður fyri, at Russland eigur at brynja seg til at standa ímóti tí, sum hann kallar eina hernaðarliga hóttan frá NATO.

### New York avhildið ferðamál

Ongantíð hava so mong fólk verið í New York og ferðast sum í fjør. Sambært ferðavinnuni hevði býurin 46 milliónir vitjandi í fjør. Tað er fimm prosent fleiri enn árið fyri og samstundis nýtt met. Av teimum vitjandi vóru 8,5 milliónir útlendingar, og tað var júst tað sama sum vanlukkuárið 2001. Ferðafólkini brúktu nógvar pengar í New York í fjør, og mett verður, at tey løgdu 28 mia. dollarar ella 140 mia. krónur eftir seg.